Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Árni Skaale, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Skanning av prostatasjúklingum

Spurningar:

1. Hvussu nógv kostar tað at senda 28 sjúklingar til Danmarkar til skanningar fyri prostata?
2. Hvussu nógv hevði tað kostað at gjørt hesar skanningarnar í Føroyum?
3. Eru fyrireikingarnar, í samband við at ein skannari er settur upp á Klaksvíkar sjúkrahúsi, gjørdar á nøktandi hátt?
4. Hvør er orsøkin til, at hesir 28 sjúklingarnir ikki kunnu skannast í Føroyum?

Viðmerkingar:
Seinastu dagarnar hevur ein søga um 28 sjúklingar, sum ikki sleppa til skanningar í Føroyum, verið at síggja í miðlunum.
Tað er við stórari undran, at undirritaði hevur fylgt við í hesari miðlasøguni. Mótstríðandi røddir hava verið frammi um hetta málið, so fyri at fáa ítøkiligar upplýsingar verða hesir spurningarnir settir.

Á Løgtingi, 7. juni 2024

Árni Skaale